




# Fólkið skal siga sína hugsan um blokkin

**Miðflokkurn skjýtur nú upp, at ein vegleiðandi fólkaatkvøða verður gjørd um ætlaðu minkingina av blokkstuðlinum frá danska statinum**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Miðflokkurin vil nú hava føroyska fólkið at siga sína hugsan um minkingina av blokkstuðlinum, sum landsstýrið hevur stig til.

Jenis av Rana hevur vegna Miðflokkin gjørt uppskotið, sum skal leggjast fyri tingið.

Í fyrsta lagi verður heitt á landsstýrið um sum skjótast at leggj uppskot um blokkstuðulin fyri tingið at taka støðu til. Miðflokkurn vísir á, at landsstýrið hevur tikið stig til at mina blokkin uttan at formligu viðurskiftini eru í lagi.

Áðrenn landsstýrið kann senda eina formliga áheitan á donsku stjórnina um at minka blokkin, má løgtingið fyrst hava samtykt hetta, og tað hevur tað ikki enn.

– Tí má landsstýrið sum skjótast gera eitt uppskot um blokkstuðulin fyri 2002, og so løgtingið kann sleppa at viðgera hetta málið, sigur Jenis av Rana.

## Fólk eru ótrygg

Miðflokkurin heldur, at minkingini av blokkstuðulinum fer at fáa so stórar búskaparligar avleiðingar fyri føroyska samfelagið, at flokkurin heldur, at fólkið eigur at siga gott fyri hesi ætlan, áðrenn hon verður gjøgnumførd.

– Hetta líkist eini seinastu roynd at fáa okkurt á skafti á fullveldisleið áðrenn valið, men vandin er, at hetta kann forkoma fullveldinum, tí fólk kenna seg ótrygg við støðuna, og tí venda tey sær ímóti fullveldisgongdini, sigur Jenis av Rana.

Hann heldur, at landsstýrið eigur at fáa formliga partin av arbeiðnum við blokkinum upp á pláss. Higartil hevur løgtingið einki uppskot fingið, og danska stjórnin er gingið eini umbøn frá føroyska landsstýrinum á møti, uttan at landsstýrið hevur heimild til at senda eina formliga umbøn um at minka blokkin.

## Vanlukkulig støð

Jenis av Rana heldur, at hóast tíðirnar eru góðar, liggur nógv á láni í samfelagnum.

– Heilsuverkið hevur neyvan í nýggjari tíð nakrantíð verið so órøkt og niðurundirkomið sum nú, gomul liggja hjálparleys vegna vantandi røktarpláss og lítla játtan til heimarøk, tey brekaðu og sálarliga veiku hava vanlukkuligar umstøður og føroyska skúlaverkið tykist fara alt meira í upploysn, heldur Jenis av Rana.

– Alt ov trongir fíggjarkarmar eru orsøkin til hesa støðu, og tí kennist tað sera løgið, at landsstúyrið einvíst ætlar at fara undir eina lækking av blokkstuðlinum. – Vit halda hesa ætlan vera høpisleysa, serliga tá hugsað verður um vánaligu støðuna hjá nógvum samfelagsbólkum, og tí eigur hvør einstakur føroyingur at sleppa at siga sína hugsan um hesa ætlan, áðrenn politikararnir fara einvíst at geva út av ognum teirra, sigur Jenis av Rana.



*– Vit halda ætlanina at skerja blokkin vera høpisleysa, serliga tá hugsað verður um vánaligu støðuna hjá nógvum samfelagsbólkum, og tí eigur hvør einstakur føroyingur at sleppa at siga sína hugsan um hesa ætlan, sigur Jenis av Rana.*

# Leitingin ikki nøktandi úrslit

**BP er nú givið at bora á leitimiðnum Svínoy, men oljufelagið fann ikki stórar nøgdir av olju ella gassi**

OLJUVINNA
*Eyðun Klakstein*

Oljufelagið BP er nú givist við leitingini eftir olju í brunninum Svínoy, og úrslitið vísti, at hóast olja og gass finnist á økinum, so var tað ikki í so stórum nøgdum, at framleiðsla kann spyrjast burturúr.

– Enn einaferð má staðfestast, at leitingin ikki gav tað úrslitið, sum eg hevði vónað. Kortini er tað positivt at fáa váttað, at tvit hava ein virkna oljuskipan á føroyskum øki, og at vánirnar at finna olju í rakstrarverdum nøgdum eru batnaðar, sigur Eyðun Elttør, sum landsstýrismaður við oljumálum.

Boriskipið West Navion, sum hevur leitað eftir olju fyri BP, boraði á 1.074 metra dýpi, og brunnurin, sum er boraður, røkkur 4.354 metrar undir sjóvarmálan.

## Virkin skipan

Boriarbeiðið hevur verið merkt av stórum trupulleikum í djúpara partinum av brunninum.

Hóast tað eydnaðist tað at gera eina røð av mátingum og taka grótroyndir í dýpinum, áðrenn gjørt varð av at steðga boringini 22. september.

Boringin á Svínoy miðinum náddi niður ígjøgnum fláirnar, ið vóru høvuðsmál fyri leitibrunninum, og hon staðfesti, at olja og gass finnist á økinum, men tað nøgdin er lítil.

Úrslitið av boringini vísir, at Føroyaøkið inniheldur eina virkna kolvetnisskipan, og at tað finnast sangrýtisfláir við góðum egileikum at goyma olju og gass.

Men niðurstøðan av hesi boring er, at tað setir ikki gongd á nakra føroyska oljuvinnu.



*Boriskipið West Navion*

